



*Á myrkum vegi, har eingi gøtuljós eru, sær bilførarin í mesta lagi tað, sum fjarljósini hjá bilinum megna at lýsa upp*

*Óhapp tilsamans*




*Tølini hjá Landsverk fyri 2005 visa týðiliga, at ferðsluóhappini gerast fleiri í myrku vetrartíðini.*

# hondum

**báðar vegir, áðrenn tey fara út á vegin.**

- **Er gonguteigur, lær tey so altíð at brúka hann, tá tey skulu tvørtur um vegin.**
- **Skulu tey tvørtur um vegin, er best at fara har, sum vegurin er beinur, og sýnið er gott.**
- **Bið tey ansa serliga væl eftir, tá tey fara út á vegin ímillum parkeraðar bilar ella aðrastaðni, har tey ikki síggjast væl.**
- **Lær tey at ganga kvikliga tvørtur um vegin heldur enn at renna.**

Og vetrarmyrkrið ger tað eisini alneyðugt, at børnini hava ljós klæði og endurskin á klæðunum.

Vit eiga at kenna eina serliga ábyrgd fyri børnunum, ið júst eru byrjaðið í skúla ella dagstovni. Í hesum sambandi hava Ráðið fyri Ferslutrygd og Tryggingarfelagið Føroyar seinnu árini samstarvað um at veita øllum fyrsta floks næmigum í Føroyum gular, sera sjónligar vestar. Vestarnir er vornir partur av býar- og bygdamyndini kring landið. Javnan síggjast fylgi av børnum í gulu vestunum.

Avbjóðingin hjá foreldrunum er at halda børnini til at nýta vestarnar so leingi sum yvirhøvur til ber.

## Bilførarar

Men eisini hjá bilførarum eru nógvir vandar um veturin, veðurlíkindini sýnast mangan at skifta millum illveður og stilli og hálku. Samstundis lýsir seint fyri degi, og skýmingin kemur tíðliga.

Neyðugt er tí at kanna dekk og ljós eina eyka ferð, nú vit byrja uppá veturin.

Vit mugu kanna, at allar perur á bilinum kunnu lýsa. Og í hálku er umráðandi at kanna, um dekkini er gjørd til vetrarkoyring, og um mynsturdýpdin er hóskandi.

Mynsturdýpdin á dekkunum eigur ongantíð at fara niður um 1,6 mm. Flest øll nýggj dekk hava eina rípu millum dekkbanarnar, sum vísir, hvussu nógv dekkini eru slitin. Um dekkið er slitið niður til rípuna, er dekkið ólógligt.

FDM mælir til, at dekkini verða skift, tá dýpdin fer niður um 3 mm. Til samanberingar hava nýggj dekk eina mynsturdýpd uppá 7-8 mm.

Hóast akførini eru í lagi, og fótgangarar nýta vest ella endurskin, er ikki sloppið. Týdningarmesta fyribyrgingin av ferðsluvanlukkum á vetri sum á sumri er, at vit, sum ferðast í ferðsluni, vísa fyrilit fyri hvørjum øðrum.